

# YVIRGANGSMENN SLUPPU ÚR USA DAGIN FYRI ATSÓKNIRNAR 11. SEPTEMBER

**YVIRGANGUR** Myndugleikarnir í USA leita eftir einum higartil ókendum bólki, sum er undir illgruna fyri at hava verið við til at fyrireika atsóknirnar tann 11. september í 2001. Hóast menninir elvdu til illgruna, sluppu teir úr USA dagin fyri atsóknirnar

*United Airlines 175 hevur júst rakt tað syðra World Trade Center-tornið*
*Mynd: AP*

Árni Joensen

Amerikonsku myndugleikarnir eru framvegis ikki lidnir at kanna, hvat veruliga hendi upp undir yvirgangsatsóknirnar tann 11. september í 2001. Skjøl, sum WikiLeaks hevur kunngjørt, vísa, at samveldisløgreglan FBI er í ferð við at kanna leiklutin hjá trimum monnum úr Qatar, sum eru undir illgruna fyri at hava havt samband við atsóknirnar.

Sambært bretska blaðnum Daily Telegraph hevur ein amerikanskur diplomatur í Qatar sagt myndugleikunum Washington, at teir tríggir menninir eru undir illgruna fyri at hava verið í New York og Washington og eygleitt støðini, sum vórðu álopin tann 11. september. Millum annað vóru menninir við World Trade Center, Frælsisstandmyndina, Hvítu Húsini og fleiri støð í Virginia.

Teir tríggir menninir fóru við flogfari úr USA til London tann 10. september ella dagin fyri atsóknirnar. Undan fráferðini gistu teir á einum hotelli í Los Angeles, og har undraðust reingerðarkvinnurnar á, at menninir vildu ikki lova teimum inn á kamarið at rudda. Starvsfólk á hotellinum høvdu kortini bitið merki í, at menninir høvdu fleiri búnar, sum líktust flogskiparabúnum.

Teir tríggir menninir úr Qatar høvdu ferðaseðlar til eitt Boeing 757-flogfar hjá American Airlines úr Los Angeles til Washington tann 10. september. Men menninir fóru ongantíð í tað flogfarið, men í eitt annað, sum fór til London.

Dagin eftir fleyg tað sama Boeing 757-flogfarið inn í verjumálaráðið Pentagon, har 184 fólk doyðu.

## Fingu illgruna

Í skjølunum, sum myndugleikarnir í Washington hava fingið úr Qatar, standur, at starvsfólk á hotellinum í Los Angeles høvdu varnast ymiskt løgið ella óvanligt við teimum trimum gestunum.

- Starvsfólk fingu illgruna til menninar, tí teir høvdu fleiri flogskiparabúnar og fleiri farteldur. Harumframt høvdu menninir fleiri pappeskjur við áskrift, sum vísti, at eskjurnar skuldu til Sýrialands, Jerusalem, Afghanistan og Jordan, standur í skjølunum úr Qatar.

Har standur eisini, at menninir høvdu eina fartelefon, sum var knýtt til eina farteldu við einum metaltráði, og at teir høvdu fleiri yvirlit við nøvnum á flogfeløgum, flogskiparum og fráferðum.

Sambært Daily Telegraph hava kanningar hjá FBI víst, at ein maður, sum er dømdur fyri yvirgang, rindaði bæði hotellið og flogferðaseðlarnar hjá teimum trimum monnunum úr Qatar.

*arni/sosialurin.fo*



*American Airlines-flogfarið, sum teir tríggir menninir úr Qatar høvdu ferðaseðil til, rendi inn í verjumálaráðið Pentagon*
*Mynd: AP*